gult cyan magenta svart

MINNISKONSERT. T‡sdagin ver›ur minniskonsert vi› Afzelius-sangum á føroyskum í Nor›urlandahúsinum, har Mikael Wiehe ver›ur vi›. Samstundis ver›ur fløgan "Sangur til frælsi" givin út

Afzelius in memoriam

Birgir Kruse

Hin 16. februar í fjør doy›i sangarin Björan Afzelius 52 ára gamal. Hann gjørdist kendur í n‡skapandi svenska bólkinum Hoola Bandoola Band fyrru helvt av sjeytiárunum, har Mikael Wiehe eisini var vi›.

Bá›ir hava teir vitja› í Føroyum, Afzelius og Wiehe. Burtur úr teimum sangum, sum teir yrktu í Hoola Bandoola Band og seinni hvør í sínum lagi, eru fleiri vor›nir fólkaogn í nor›urlendskum sangbókum. Millum teir kendastu munnu ver›a "Juanita" hjá Afzelius og "Som en duva" og "Mitt hjärtas fågel" hjá Wiehe. Hesar bá›ar seinnu sungu teir í felag á plátu í 1986.

Fyrstu plátuna gav Afzelius út í 1974. Ta› var LP-plátan "Väm är det som är rädd" har sangurin "Bläckfisken" bleiv kendur. Fyrsta single pláta hjá Afzelius kom tó ikki fyrr enn í 1990 "Tusen bitar". Hetta var svensk umseting av sanginum hjá donsku Onnu Linnet. Sama ári› vitja›i hann í Føroyum vi› Billy Cross.

Nú er Afzelius aftur á plakatini – posthumt, förstås. Men á sama sta›. Í Nor›urlandahúsinum.

Orsøkin er, at teir føroyingar, sum altí› hava havt tokka til Afzelius, hava umsett 11 av sangum hansara og geva teir út á fløgu. Heiti› er "Sangur til frælsi" eftir "Sång till friheten", sum Afzelius sjálvur t‡ddi og sang á plátuni "Innan tystnaden" í 1982. Upphavsma›ur til henda sang er Silvio Rodrigues og rættindini umsitur Editoria Musical de Cuba.

Umframt at Steintór Rasmussen hevur umsett henda kubanska slagsang til føroyskt, hevur nor›ma›urin Jan Eggum eisini flutt hann í norskan búna›, eins og Bente Barfoed hevur t‡tt hann til danskt. Í "Nordisk Visbok" frá 1994 sigur svenski vísusangarin, Sid Jansson, at Silvio Rodriguez er millum kendastu kubansku vísusangararnar í nuevo-trova stílinum. Rodriguez vitja›i í Svøríki 1979-80.

Føroysku fyrireikararnir hava arbeitt vi› sangunum hjá Afzelius sí›ani í vár. Upptøkurnar, sum Erik Biskopstø hevur sta›i› fyri, eru fyri største partin gjørdar í Studio Pegasus í Klaksvík. Úrvali› fevnir um elstu og n‡ggjastu sangir eftir Björn Afzelius, íalt 11. 24 tónleikarar og sangarar hava veri› vi› í verkætlanini, eins og fleiri t‡›arar hav roynt seg.

Nú fløgan "Sangur til frælsi" kemur á markna›in ver›ur samstundis skipa› fyri konsert. Hon ver›ur í Nor›urlandahúsinum t‡skvøldi› kl 19:30. Fyrireikararnir hava veri› so hepnir, at teir hava fingi› sjálvan Mikael Wiehe vi› á pallin. Einsamallur er hann á nor›urlendskari konsertfer›. Kemur úr Helsingborg, har hann sang hóskvøldi›, og eftir konertina í Nor›urlandahúsinum heldur hann áfram á fer›ast og syngja. Íalt 40 konsertir, nor›urlond í kring.

Mikael Wiehe gav fyrr í ár út fløguna "En sång till modet" á plátufelagnum EMI. Her n‡tti hann høvi› at savna allar vinmenninar úr gamla bólkinum Hoola Bandoola Band – uttan Afzelius, förstås.

Á mi›nátt eftir lokna konsert vi› Afzelius-sangum, letur Bókasølan dyrnar upp og fer at selja bøkur frá teim fornisku. Ein tíma inn í náttina. Eitt rimmarkvøld í høvu›sta›num.

Um ikki heilt frá A til Z, so frá Afzelius og Poulsen til Potter og Skála. Væl í gagnist!



Björn Afzelius avmynda›ur í 1990, tá hann í Svøríki gav út "Tusen bitar", sum er svensk t‡›ing av danska sanginum hjá Onnu Linnet "Tusind stykker". Hetta var fyrsta single-pláta hjá Afzelius, sum vitja›i í Føroyum hetta ári›

Svenskur gullfuglur: Martin Sandberg, alias Martin White, alias Max Martin

ÚTFLUTNINGSVØRA. Tá MTV valdi ein pall í Stockholm at handa tónleikavir›islønir, var ta› eisini tí, at sviar eru framúr at skapa tónleik. Tri›bestir í øllum heiminum

Stockholm to the Max

Birgir Kruse

Tónleikavika var herfyri í Stockholm har evropeisku MTV vir›islønirnar vór›u latnar á pallinum í Globen. Samstundis var› skipa› fyri hópin av tónleikatiltøkum í øllum b‡num. Millum anna› var› kunngjørd ein almenn frágrei›ing, har sta›fest var›, at sviar eru tri›bestir, tá umræ›ar at flyta út tónleik. Svenski høvu›ssta›urin Stockholm hevur sostatt enn einafer› eydnast at koma á hvørja framsí›u í poppver›ini og í blinkstrandi MTV kring allan knøttin.

Og ikki er ta› uttan orsøk, at fólk, i› fáast vi› tónleik á altjó›a stø›i, seta hvør ø›rum stevnu í Stockholm. Her er m.a. upptøkuhøli› Cheiron Studio, har Martin Sandberg, sum eisini gongur undir nøvnunum Martin White og Max Martin, hevur skapt hópin av altjó›a popp-stjørnum. Ella í hvussu er fleiri av sangum teirra. Telja vit upp, kunnu vit nevna 16 sangir hjá Backstreet Boys, 15 sangir hjá Britney Spears, 11 sangir hjá 5ive, 8 hjá Westlife, 5 hjá 'N Sync og stakar sangir hjá Celine Dion og Boyzone. Og ta› eru ikki bara nakrir tilvildarligir sangir í sangskráum teirra. Eitt nú "Baby, one more time" hjá Britney Spears bleiv til millum hendurnar á Martini Sandberg, alias Max Martin í Cheiron upptøkuhølunum í Stockholm í 1998.

Cheiron Studio, sum var› stovna› í 1993, letur nú aftur. Virksemi› ver›ur tiki› upp aftur í Cosmos Studios, sum eisini eru í Stockholm. Ivaleyst ver›ur hetta ein n‡ggj slagaraverksmi›ja. Cheiron er kentaurur í grikskari mytologi, sum lærir kongsins synir at dansa og syngja.

100 ÁR. Dagin eftir fø›ingardag Jørgen-Frantz Jacobsens, doyr írska skaldi› Oscar Wilde í París, 46 ára gamal. Ein av søgum hansara er t‡dd til føroyskt. Hon sn‡r seg um b‡rá›slimir og ein borgmeistara, i› kjakast um list

On the Wilde side

Birgir Kruse

Oscar Wilde var› føddur í Dublin hin 16. oktober 1854 og doy›i í París hin 30. november 1900. Hósdagurin er sostatt hundra› ára dagurin fyri dey›a hansara. Wilde fór undir lestur bæ›i í Dublin og í Oxford, har hann vann The Newdigate Prize í 1878 fyri "Ravenna", fyrsta gitna yrkingasavn hansara.

Í London gjørdist Oscar Wilde kendur sum sjónleikarithøvundur. Men eftir at hann í einum rættarmáli› í 1895 var› ákærdur fyri homoseksualitet og tískil enda›i í fangahúsi í samfull tvey ár, hvarv hann av lundunnar sjónleikarapallum. Leyslatin fekk hann sær anna› navn og r‡mdi til París, har hann doy›i 46 ára gamal. Minnismerki er sí›ani reist í Pere Lachaise kirkjugar›inum, har eisini Jim Morrison, Edith Piaf og Chopin eru grivin.

Framúr hittinor›a›i stílur Wilde's kemur best til sjóndar í leikinum "The Importance of Being Ernest" (1895). Einasta skaldsøga hansara er "The Picture of Dorian Gray" frá 1891. Tey bæ›i yrkingasøvnini "The Ballad of Reading Goal" (1898) og "De Profundis" (givi› út í 1905) blivu til í fangahúsinum 1895-97.

Oscar Wilde var ikki einans skrivandi ma›ur. Írska skaldi› William Butler Yeats (1865-1939) kalla›i hann "the greatest talker of his time". Fleiri av søgum Wilde's vór›u ikki festar á bla›, men frásagnir, hildnar upp fyri vinfólki, ella bá›um synum hansara.

Oscar Wilde metti at endamáli› hjá listafólki, skrivandi ella myndandi, var at taka listarligu krøvini í álvara og ikki helma í – "art for art's sake" sum bretar stundum siga. Men samstundis vildi hann gera vart vi›, at listarligi t‡dningurin var ikki av praktiskum slagi, men estetiskum. Listin er kn‡tt at vakurleikanum. Wilde metti seg sjálvan at vera part í eini estetiskari rørslu The Aestethic Movement, ein avleggari av greinini Art Noeveau og Jugendstíli. Í samtí›ini gjørdist Oscar Wilde tó ímyndin av komiska persóninum Bunthorne í operettuni "Patience" eftir Gilbert & Sullivan.

"All art is quite useless" seg›i Oscar Wilde. Hesin pástandur er kjarnin í søguni "The happy prince" (1888) sum ver›ur lisin í mongum skúlum. Hetta er einasta søga eftir Wilde, sum t‡dd er til føroyskt. Ó›in Ódn, i› sambært Rithøvundabókina er Levi Niclasen úr Hvalba, t‡ddi hana í 1977. Føroyska heiti er "Eydnuríki prinsurin". Hetta er ein myndabók, ætla› børnum, sum Føroya Lærarafelag gav út sama ári›. Pástandurin, um hvørt listin er n‡ttuleys ella ikki, ver›ur – ógvuliga aktuelt – lagt sum kjakevni fyri borgmeistaran og b‡rá›slimirnar í b‡num í søguni. Djúpari lagi› í hesi søgu, i› ber brá av halgisøgu, er upplegg til kjak um eitt samfelag, sum n‡tir pening til list, me›an fólki› doyri í hungri.

Sí›ani 1960 eru seks ymsir filmar gjørdir um Oscar Wilde. Hin n‡ggjasti "Wilde" er frá 1997. Har hevur Stephen Fry høvu›sleiklutin sum Oscar. Á heimasí›uni hjá hesum filmi www.oscarwilde.com ber til at hoyra Fry lesa úr trimum tekstum hjá Oscar Wilde. Teir eru "De Profundis", "The Ballad of Reading Goal" og "The Selfish Giant". Eisini ber til um alnótina at taka ni›ur kendastu tekstir hjá Wilde og skriva teir út. Ta› er fyrst og fremst Project Guthenberg, sum hevur fingi› hetta í lag.

SJÓNLEIKUR. Hóskvøldi› skipar Gríma fyri Dario Fo kvøldi› á Meiarínum í Havn. Hetta er ein rundfer› í tekstum hansara og brot úr leikum og monologum ver›a framførd

Dario Fo, skemt – og tó

Birgir Kruse

Dario Fo man vera hin kendasti persónur innan sjónleik í vesturheiminum, solei›is í n‡ggjari tí›ina. Í hesum høpi hevur Dario Fo funni› og skapt tann formin, sum hóskar hansara egna sinni best, nevniliga farsuna, glantrileikin.

Hann skrivar og spælir sjónleik, komponerar tónleik og leikstjórnar. Granskari er hann eisini. Hevur granska› og kanna› sjónleik og fyribrigdi kn‡tt at hesi klassisku listargrein fleiri hundra› ár aftur í tí›ina.

Dario Fo gjørdist varugur vi›, at farsan uppruna-liga var› brúkt til at siga frá um okkurt álvarsligt, at grei›a frá samfelagsligum skeivleikum, ella í eini roynd at avdúka politiskar skálkager›ir.

Saman vi› konuni Franca Rame hevur hann skriva›, spælt og sett upp óteljandi leikir, samrø›ur og einrø›ur, har tey brúka skemti›, komikkin, til at avdúka ta› álvarsliga. Vit flenna, men vi› eitt situr láturin í hálsinum, stir›nar, og vit fara at hugsa.

Í 1997 fekk Dario Fo bókmentavir›isløn Nobels vi› m.a. hesi grundgeving: "Hann hevur vi› sínum kynstri trúgvur sta›i› vi› li›ina á teimum minni mentu. Í samljó›i vi› gyklarar frá mi›øld, hevur hann harta› valdsharrarnar og hildi› fast í sjálvsvir›ing teirra kúga›u."



Eisini á føroyskum palli er Dario Fo væl kendur. Gríma hevur spælt fleiri av hansara leikum. Til dømis "Vit eiga ikki eitt oyra, vit lata ikki eitt oyra" í 1979, "Gykl og gerandisdagar – 2 kvinnumonologar" í 1981, " Sjeynda bo› – stjal eitt sindur minni " í 1991 og " Ví›opi› hjúnalag" í 1996. Allir hesir leikir hava veri› sera væl umtóktir millum føroysku ásko›ararnar. Føroyska leikkonan Gunnvør Nolsøe, sum er fødd og uppvaksin í Keypmannahavn, hevur leikstjórna›, tá Gríma hevur spælt nevndu leikur eftir Dario.

Ætlanin vi› Dario Fo kvøldinum á Meiarínum hóskvøldi›, er at gera eina rundfer› í ymsu tekstum hansara og at framføra brot úr onkrum leiki og monologi. Ein av teimum væl-dámdu monologunum hjá Dario Fo "Brúdleypi› í Kána" ver›ur at síggja í heilum líki. Ta› er Egi Dam sum fer at framføra hann.



Gríma ætlar vi› hesi kvøldsetu í Meiarínum, at senda Dario Fo eina seinka›a kvø›u í sambandi vi› stóru Nobelvir›islønina, hann fekk herfyri.